# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Próvtøkur á Vinnuháskúlanum

**Fríggjadagin 21. desember 2007 var próvhandan á Vinnuháskúlanum, har 15 næmingar fingu prógv, seks skiparar, fimm skipsførarar og fýra maskinmeistarar.**



***Skipsførarar:*** *Fróði Jóanesarson, Hans Christian Myrup, Sámal Joensen, Torkil Jonsson, og Vagnur Kjærbech Nolsøe*



***Skiparar:*** *Aksel Terji Mikkelsen, Beinir Olavus Vestergaard, Høgni Magnusson, Mourits Danberg og Regin Nicolajsen. Magnus Berg vantar á myndini.*



*Maskinmeistarar: Áslakur Nesá, Asbjørn Johannessen, Bogi Norðfoss og Leivur Justinnussen*

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Hjørdis Massdóttir** fer úr Landssjúkrahúskapellinum hóskvøldið kl. 18.00 í Vesturkirkjuna. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni fríggjadagin kl. 12.00 hagani farið verður til Nólsoyar. Tey, ið vilja minnast Hjørdis, kunnu ístaðin fyri blómur lata Diabetesfelag Føroya eina peningagávu

**Jóannes F. Petersen úr Rituvík** andaðist á Eysturoyar Ellis- og Røktarheimi mánadagin, 85 ára gamal. Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík hóskvøldið kl. 18 í Rituvíkar kirkju. Jarðarferðin verður fríggjadagin klokkan 13. Sálmabókin verður nýtt. Tey ið vilja minnast Jóannes, kunnu lata Rituvíkar kirkju eina gávu.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at okkara høgt elskaða kona, mamma, vermamma,
omma og langomma

**Sonja Magreta Olsen**

ættað úr Skúvoy, búsitandi í Miðvági

andaðist á Landsjúkrahúsinum mikumorgunin
72 ára gomul.
Bønarhald verður í Landsjúkrahúskapellinum
fríggjakvøldið kl. 18

Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13 úr Miðvágskirkju.

*Familjunnar vegna*
**Hans Jacob**
**Marianna, Christian og Jónfinn**
**v/familjum**

Tey sum vilja minnast Sonju kunnu lata Diabetisfelag Føroya eina gávu. Konta í peningastovninum

**Dagurin**
**4. januar. Metusalem**, sonur Enoks. Hann gjørdist 969 ár (1. Mós, 5, 25-27).

